# Skuldi havt boðið pressuni við

**Vit taka tilfarið til hesa grein í tí datorøð, sum tað kann staðfestast og fara so at gera viðmerkingar so hvørt. Tað sum stendur í parentes er eisini viðmerkingar.**

**Tað fyrsta er bræv, sum Morel skrivar til Dollan. Hetta er svar til Dollan, og vit mugu bert gita okkum til hansara bræv**

## Morel skrivar 17. november 1903:

Mín góði harri,
Eg havi fingið tygara bræv frá 14 í h. við peningaflutningi 3 shillingar og 6 pensar. Eg havi í serligum brævbjálva sent eintakið av "West African Mail", har brøvini hjá Mr. Week (trúboðari í Congo) eru prentað. Eg sendi eisini seinasta blaðið. Eg vil senda tygum fimm fylgjandi bløð, soleiðis sum tygum hava biðið um. Eg sendi eisini sum umbiðið 12 eintøk av (bókini) "Congo Trælastatinum" til tygara bústað í Glasgow.

**Viðvíkjandi tygara kunning:**
Eg havi sjálvandi tosað og skrivað við Dr. Grattan Guiness (leiðari í Balolo Missiónini) um tygara kunningartilfar. Mítt sjónarmið er, at uttan mun til stjórn ella ikki stjórn, eiga vit ikki at spilla meira tíð, áðrenn vit almannakunngera hetta tilfar. Eg haldi, at øll seinkan ger okkara sak verri. Eg havi sagt Dr Grattan Guiness frá hesum, men hvør maður má døma sjálvur.

Tað seinasta hugskotið er at úseta almannakunngerðina av tygara tilfari til januar, og at tað so samstundis verður prentað í blaðnum Regions Beyond (blaðið hjá Balolo missiónini) og The West African Mail (blaðið hjá Morel). Men eg havi heitt á Dr. Grattan Guinness um at lata meg fáa nakrar av tygara fotomyndum til taks áðrenn hesa tíð. Kanska kundu tygum skriva til hansara um hetta sama. Undir øllum umstøðum kunnu tygum senda honum eitt avrit av hesum brævi, um tygum vilja tað. Eg vóni, at allar myndir hava sína søgu. Annars vil tað geva okkara fíggindum møguleika fyri at sáa iva um tær.

Tygum nevndu, at tygum 7. og 8. í hesum mánaðinum (november 1903) taladu fyri 4 ella 5.000 fólkum í Edinburgh. Eg vóni, at tað vildi verið møguligt (eg tosi við allari virðing) at geva tykkara trúboðarum kunning um, hvussu boðskapurin kann kom út til fólk. Hvør veit hvat tygum taladu um til hesi 4-5000 fólkini? Ikki ein sál, uttan tey sum vóru til staðar.

Men um tygum høvdu umboð fyri fjølmiðlarnar til staðar, høvdu tygara orð verið endurgivin í øllum landinum. Tað, sum umræður, er at fáa slíkt í bløðini, so tað kann vekja ans millum fólk. Kemur slíkt ikki í bløðini, so koma fólk heldur ikki at varnast hesi viðurskifti. Tað ræður um, at tað verður gjørt eitt miðvíst arbeiði fyri at gera fólk var um hesi viðurskifti fyri at skapa eina fólksliga meining, sum kann stuðla okkara virksemi.

Um tygum kunnu geva mær ein samandrátt av tí, tygum søgdu fyri hesum 4-5000 fólkunum um vanstýrið í Congo, so skal eg prenta tað í mínum blaði. Og næstu ferð tygum tala, eiga tygum at hava umboð fyri fjølmiðlarnar til staðar. Tað, sum eg skrivi, her havi eg munnliga sagt við Dr. Grattan Guiness.

Hesin bardagin má vera kempaður við miðvísum og áhaldandi álopum. Tað ber ikki til at leypa á og so at fara at hugsa um, hvat næsta stigið skal vera. Áhaldandi at smekka til er einasti vegur at fasthalda áhugan hjá fólkinum.

Tað er óneyðugt at siga, at eg vil vera fegin og takksamur fyri alla kunning, ið tygum kunnu geva mær eina og hvørja tíð um hetta evnið, um tygum skriva frá Afrika ella Europa. Tygum vilja skilja, at sjálvsagt vil eg ikki ganga aftanfyri ryggin á Dr. Grattan Guinnes á nakran hátt. Tygum mugu ganga undir boðum hjá tygara formanni og vilja náttúrliga gera so. Men eg eri sannførdur um, at vit taka ta tíð sum skal til, men øll kunning skal kunngerast beinanvegin.

***Tygara***
***E D Morel***

**Viðmerking**
Bóklingurin, Morel vísir til, kallast "The Congo Slave State", og hann kom út í 1903. Hann telur 112 síður og her verður fyri hvønn landspart í Congo sær greitt frá støðuni. Eisini er eitt yvirlit yvir inn- og útflutning hjá Congo, og her eru tøl sum vísa, at bert 20% av tí, sum varð útflutt til Congo, kundi koma fólkinum til góðar.

Eisini er í hesi bók ein frágreiðing frá orðaskiftinum í bretska parlamentinum tann 20. mai 1903 um Congo.

Tað er greitt, at Dollin hevur havt myndir heim við sær, sum hann sjálvur hevur tikið. Hann hevur jú eisini víst tær í Føroyum. Vit hava roynt at finna hesar myndir, men tað hevur ikki eydnast enn.

# Frásøgn frá fundi hjá Dollanum

**Tað tykist sum at Dollin hevur tikið hetta við pressuni í álvara, og nú kemur ein frásøgn frá fundi hjá Dollanum. Hetta man helst vera frá umrødda fundinum í Edinburgh.**

**Greinin er í The Western Africa Mail tann 27. november, og er soljóðandi:**

## Fer Europa at vakna áðrenn tað er ov seint?
## D. J. Danielson og Congo ræðuleikarnir.
## "Hvør maður, kona og barn í gummiøkjunum er trælur."
## "Fara tey at drepa okkum øll, áðrenn tey fara avstað"

### Serlig grein til West African Mail

Frá okkara korrespondenti

Harra D. J, Danielson, sum er knýttur at trúboðarafelagsskapinium Regions Beyond (tað sama sum Balolo) hevur seinastu tíðina havt eina røð av fyrilestrum í Edinburgh um evnið "vanstýrið í Congo". Á einum fundi vóru 3.000 fólk sum lurtaðu eftir honum í Synod Hall í Edinburgh. Harra Danielson fordømdi harðliga ta kúging, sum verður framd móti teimum innføddu. Gummiídnaðurin, um tað kann kallast ídnaður, staðfesti Danielson, var skjótt við at beina fyri teimum innføddu, og kundi enda við fyribeining av teim ymsu fólkasløgunum í økinum. Hetta er ein frístatur av navni, men veruliga er hetta ein trælastatur.

Harra Danielson segði, at hann var júst komin heim úr Congo. Hann hevur í tvey ár búð inni í landinum í einum av gummiøkjunum, har ein belgisk fyritøka rekur sítt virksemi við mishandling av fólkinum við hjálp av almennum myndugleikum, og hesir arbeiða hond í hond. Danielson helt á at greiða frá, hvussu hann persónliga hevði sæð, hvussu fólkið var viðfarið. Hann hevur eisini nógvar ferðir lagt seg upp í millum og forða belgiarum og teirra handlangarum at gera seg inn á menn og kvinnur. Hann hevur myndir frá slíkum umstøðum, sum prógva hesa lamløsting, og sum er eitt úrslit av gummiídnaðinum.

Tað hevur verið sagt, at avkvettingin av hondunum á teimum innføddu var framd av hermonnum hjá congostatinum fyri, at teir kunnu fáa eins nógvar patrónir útflýggjaðar sum talið, teir lata inn av avhøgdum hondum. Men Danielson helt heldur, at endamálið eins væl var at ræða fólk, so tey kundu síggja, hvat ið væntaði teimum, um tey ikki komu við so mikið av gummi ella øðrum veitingum, sum hvíti maðurin ásetti.

### Tikin gíðslar

Tað var eisini daglig sjón at síggja kvinnur tiknar sum gíðslar, bundnar í fleiri vikur, so tær ikki skulu hava møgulreika at sleppa til hús.

Mr Danielson vísti víðari á, at hvør maður, kvinna og barn í gummiøkjinum var hildin sum trælur á hægsta stigi. Fólkið hevði tað nógv betri, áðrenn Leopold nakrantíð fekk ræðið í landinum.

Rópini hjá teimum innføddu eru samb. Danielson: "Nær hava teir hvítu gummiinnsavnararnir fingið nóg mikið av gummi? Nær eru teir nøgdir? Nær fara teir av landinum og lata okkum í frið? Fara tey at drepa okkum øll, áðrenn tey fara?"

Hetta vóru spurningar, segði Danielsen, sum ofta eru spurdir, men hvussu kunnu teir verða svaraðir.

Nógv innfødd, boðaði Danielson frá, bóðu meg, áðrenn eg fór haðani, at greiða góðum hvítum fólki í fjarum londum frá, hvussu ring støðan var hjá teimum. Og at biðja hesu um hjálp, so tey við Guds hjálp kunnu sleppa undan hesum harradømi.

Eg vil greiða øllum, eg kann, frá hesum ræðuliga trælahaldi, sum fer fram í Congostatinum. Um hetta ræðustýri heldur á leingi aftrat, vilja nógv øki vera púra manntóm.Tá fer Europa kanska at vakna. Men tá verður tað ov seint.

### Moralsk og materielt forfall

Danielson endurtók, at forbannilsið aftan fyri alt hetta var gummiskatturin. Tey innføddu fortaldu honum ofta, at í gomlum døgum plagdu tey at hava eydnusamar dagar, hóast tað vóru dømi um kannibalismu, men síðan gummisavningin hevði tikið dyk á seg, høvdu tey ikki havt ein lukkuligan dag. Tey livdu í ússaligheit, trælahaldi og fátækradømi, sum aftur førdi til umfarssjúkur (her verður vist fyrst og fremst hugsað um deyðuligu sovisjúkuna). Eitt fátækt ússaligt fólk, sum eina ferð var so væl fyri.

### Skyldurnar hjá Bretlandi

Vit prædika fyri fólki um Guds kærleika. Tey spyrja okkum: Hví loyvir Gud hesum monnum at fara so illa við okkum. Hví fríar Hann okkum ikki frá hesum illmennum. Hvussu kunnu vit svara slíkum sera viðkomandi spurningum? Má hetta land, sum Gud hevur gjørt so stórt, hjálpa hesum innføddu, sum eru so illa fyri. Fólkasløgini í Congo eru frálík fólk, men tey verða skerd og oyðiløgd.





*Hetta er seinna brævið, sum vit eiga frá Daniel J. Danielsen til Edmund Morel*